## Mousavi krevur nýskipanir



Iranski andstøðuleiðarin, Mirhossein Mousavi, heldur, at tað er neyðugt við umfatandi nýskipanum í landsins fongslum. Hann sigur, at tað, sum er hent í fongslunum, hevur gjørt teirri islamsku kollveltingini nógv størri skaða, enn USA hevur gjørt. Mehdi Karoubi, sum eins og Mousavi stillaði upp á forsetavalinum herfyri, skrivaði á heimasíðu síni fyrr í vikuni, at hann hevur fingið álítandi upplýsingar um, at nøkur av teimum, msum blivu tikin undir ófriðinum aftan á valið, vórðu álopin og neyðtikin í fongslinum. Tað snýr seg um bæði kvinnur og menn, skrivaði hann.

## Týsk mánaferð í 2015

Gongst sum ætlað, fer Týskland at senda eitt ómannað rúmdarfar upp á mánan um eini seks ár. Tað sigur ráðharrin Peter Hintze, sum umsitur búskap og tøkni. Í samrøðu við sjónvarpið ZDF sigur ráðharrin, at verandi búskaparkreppa fær onga ávirkan á ta ætlaðu mánaferðina. Sambært Hintze fer verkætlanin at kosta hálva aðru milliard evrur, og hon skal figgjast yvir eitt fimm ára skeið. Ráðharrin ásannar, at talan er um eitt stórt tal, men leggur afturat, at tann vísindaligi vinningurin rættvísger penganýtsluna.



# Nógv grót á Kolavegnum

FERÐSLUTRYGD

Tá fólk fóru eftir Kolavegnum um nínggjutíðina gjáramorguni, máttu tey ansa sær, tí nógv grót ella stórir steinar vóru komnir oman á vegin.

Tað kemur javnan fyri, at steinar koma oman á Kolavegin, og gjáramorgunin var aftur galið. Einir 10 stórir og minni steinar vóru komnir oman á vegin. Størsti steinurin var uml 150 kg til støddar.

- Eg havi tosað við fólk, sum fóru á Tvøroyri beint fyri klokkan átta, men tá var eingin steinur á vegnum. Myndin er tikin kl 8.55, og tá var sum tað sæst grót á vegnum, sigur Rúni Thomsen í Hvalba við Portalin.

# Tvær nýggjar bøkur frá Bókadeildini

BØKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Talan er um ein uppruna føroyska bók, Vinni Vespa. Sum navnið sigur er bókin um nýggja summargestin í Føroyum, vespuna sjálvandi.

Í hesi frálíku myndabókini hoyra vit um drotningavespuna Vinni.

Vinni Vespa vaknar eftir at hava sovið ein heila vetur. Bókin lýsir á stuttligan hátt, hvussu vit ræaðast vespurnar sum pestina, og hvønn týdning vespurnar hava. Ein frálík bók til tey trý til seks ára gomlu, sum læra at síggja vespuna á ein øðrvísi hátt.

Oddvør Johansen hevur skrivað bókina, og Jón Sonni Jensen hevur teknað vøkru myndirnar.

Bókin er 28 blaðsíður og kostar 150 krónur.

Hin bókin er um Edvin, sum byrjar í 1. b. Hann gleðir seg sjálvandi, men mamman og pápin hava gloym at keypa honum eina skúlatasku. Tí fær hann eina gamla, sum er alt ov stór. Næstan alt rúmast í henni, men so verður hon eisini tung at bera.

Bókin er tann næsta í eini røð um 1. b, men bøkurnar kunnu saktans lesast sjálvstøðugt, sigur Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Bókin, sum er ætlað teimum sjey til níggju ára gomlu, er 56 blaðsíður, løtt at lesa og stuttlig at lurta eftir. Hildigunn Niclasen hevur týtt bókina, sum kostart 95 krónur.



*Søgan um Vinni Vespu, sum Oddvør Johansen hevur skrivað, er um nýggja summargestin í Føroyum. Jón Sonni Jensen hevur teknað myndirnar*

# Tónleikavinnudagur í Sjónleikarhúsinum

**Nakrir av fremstu tónleikarum í USA vera partur av stórum føroyskum tónleikavinnudegi 27. August. Føroyski produsarin Óli Poulsen verður eisini við.**

TÓNLEIKUR

Hvat skal til fyri at klára seg í altjóða tónleikahøpi? Hvussu verður eitt hitt lag framleitt? Hvagani kemur Nashville soundið? Hesir og mangir aðrir spurningar vera havdir á lofti, tá tónleikavinnudagurin fer av bakkastokki í Sjónleikarhúsinum hósdagin 27. august.

Í hesum sambandi vera nakrir av fremstu tónleikarum í heiminum til staðar í skjótt aldargamla leikhúsinum í hjartanum í Havn. Teirra millum tríggir av mest brúktu studio tónleikarum í heiminum – guitarleikarin Brent Mason, steel spælarin Paul Franklin og trummusláarin Paul Leim.

Somuleiðis fer fremsti føroyski produsarin seinastu 20 árini Óla Poulsen at vera við. Hann fer saman við amerikonsku tónleikarunum at framleiða eitt nýskrivað lag á pallinum í Sjónleikarhúsinum. Her verður høvi at fáa innlit í, hvussu eitt lag kann mýkjast frá føðing á einum kassaguitara ella klaveri til tað er at hoyra fullfloygt í útvarpi ella á fløgu. Til høvið hava fyrireikararnir fingið serligan sangara at koma at framføra lagið, ið arbeitt verður við í Sjónleikarhúsinum hetta kvøldið.

Eisini fer amerikanski pianisturin og produsarin Edgar Struble at greiða frá sínum leikluti sum orkesturleiðari hjá Kenny Rogers júst um tað mundið, tá hesin fekk sítt altjóða gjøgnumbrot.

Møguligt verður hjá áhoyrarunum at seta spurningar til allar luttakararnar. Birgir Kruse fer at samskipa hetta kvøldið í Sjónleikarhúsinum og hann verður somuleiðis orðstýrari.

Tað er føroyska felagið AEL, ið við skipar fyri tónleikavinnudegnum. Tónleikavinnudagurin er sostatt partur av Nashville.fo døgum, ið enda við eini gallakonsert í Ítróttarhøllini á Hálsi 29. August. Kostnaðurin at luttaka til tónleikavinnudagin er 500,- krónur og til ber at tekna seg við at venda sær til nýggja tónleikahandilin Soundcheck, sum heldur til í Miðlon í Tórshavn. Tað sleppa í mesta lagi 100 fólk at luttaka á tónleikavinnudegnum. Øll eru vælkomin at tekna seg.

Serligir stuðlar til tiltakið eru Eik og Tórshavnar Býráð. Tiltakið er eisini stuðlað av Rás2/Sosialinum og Soundcheck.

**Skrá:**

18:30 Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, setur tónleikavinnudagin
18:40 Tónleikarar framføra eitt lag
18:45 Edgar Struble hevur fyrilestur um 2 evni Carriers in the music business/my years with Kenny Rogers
19:15 Tónleikarar framføra eitt lag
19:20 Paul Leim hevur fyrilestur "Making it to the "Show" – The Studio 'A' Team."
19:45 Tónleikarar framføra eitt lag
19:50 Steðgur okkurt til matna og høvi verður at hitta tónleikarar

20:15 Tónleikarar framføra eitt lag
20:20 Eitt nýskrivað lag verður lagt fram í demo form.
20:30 John Hoobs hevur fyrilestur um "The Nashville numbre system."
20:45 Óli Poulsen hevur fyrilestur um at produsera, tað nýggja lagið, ið varð spælt í demo form, verður produserað av Óla Poulsen á staðnum. Hann brúkar allar tónleikarnar aktivt á staðnum.
21:20 Sangari kemur á pallin og syngur sangin, ið Óli hevur produserað saman við amerukansku tónleikarinum.
21:30 Tónleikarar framføra eitt lag
21:35 Panel har allir tónleikarar luttaka Birgir Krusø verður orðstýrari, og høvi verður hjá áhoyrarum at luttaka.
22:10 Tónleikarar framføra eitt lag
22:15 Endi og høvi verður at hitta tónleikarar